

## VÆL UMTÓKTAR

*Bøkurnar við skakandi tilburðum hava verið sera væl móttiknar av fólki. Teir hava selt bókina í bókhandlum og við at ganga frá húsi til hús. Úrslitið er, at bókin hevur ligið ovarlaga á sølulistunum. - Vit eru sera fegnir um undirtøkuna, sigur John Myllhamar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**» Um allar hesar hendingarnar ikki vórðu skrivaðar niður, var stórur vandi fyri at tær fóru í gloymskuna. Nú eru fleiri teirra savnaðar saman í hesi bókarøðin**

## Virkin

John Myllhamar (1949) hevur týtt fleiri bøkur, skrivað tvær lestrabøkur, hevur skrivað og umsett ein hóp av sálmum og sangum, og hevur nú skrivað hesar fimm bøkurnar í røðini við skakandi tilburðum.
Í 1990 týddi hann bókina "Tá ið vit missa ein kæran" eftir Fredrik Wisløff. Í 1992 "Hvíld á sjúkraleguni" eftir H.E.Wisløff. Í 1995 "Í góðum hondum" eftir Georg S. Geil, og í 2006 "Náttin verður morgun" eftir Georg S. Geil.
Í 2006 gav hann haraftrat út fyrru lestrarbókina "Orð títt er sannleikin", og fyrr í ár næstu lestrabókina "Í fyrstuni var orðið".

Føroyaprent plantar trø